

Dátueftirlitið

Ársfrágreiðing 2014

INNIHALD

1. Fororð 5

2. Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan 6
- 2.1. Játtanin á løgtingsfíggjarlógini 6
- 2.2. Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum 7
- 2.3. Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum 7

3. Virksemi í árinum 2014 9
- 3.1. Norðurlendskir fundir 10
- 3.2. Tryggari Internetdagur 10
- 3.3. Framløga á skúlum 11
- 3.4. Eftirlit 11
- 3.5. Hagtøl 11
- 3.6. Munnligir fyrispurningar 14
- 3.7. Loyvi og fráboðanir 15
  - 3.7.1. Loyvi til verkætlanir 16
  - 3.7.2. Verkætlan: Nýføðingar við CTD 16
  - 3.7.3. Verkætlan: Evakueringsroyndir á bústovnum 16
  - 3.7.4. Verkætlan: Eginumsorgan og vitan hjá sjúklingum við hjartasvíkjan 16
  - 3.7.5. Verkætlan: Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum 17
  - 3.7.6. Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir) 17
- 3.8. Hoyringar 18
  - 3.8.1. Lógaruppskot 18
  - 3.8.2. Kunngerðir 18
  - 3.8.3. KT-politikkur 18
- 3.9. Vegleiðingar 18

4. Ávís útvald mál í 2014 20
- 4.1 Ymisk mál 20
  - 4.1.1. Kæra um skráseting av sjúkrafráveru 20
  - 4.1.2. Fyrispurningur til Føroya Landfúta um vakmyndatól í hýruvognum 20
  - 4.1.3. Vakmyndatól í nýggja terminalinum hjá Vága Floghavn 21
  - 4.1.4. Logging hjá telefyritøku 21
  - 4.1.5. Mentamálaráðið og talgildu landsroyndirnar 22
  - 4.1.6. NÁM og First Class skipanin 22
  - 4.1.7. Kæra um starvsfólkaviðurskifti á bensinstøð 23
  - 4.1.8. Streaming av býráðsfundum 23
  - 4.1.9. Broyting av samtyktini um goyming av data 24
- 4.2. Mál tikin upp av egnum ávum 24

5. Altjóða samstarv 26
- 5.1. Triðjalandsgóðkenning frá ES nevndini 26
- 5.2. Norðurlond 27

6. Eftirlit í 2014 29
- 6.1. Eftirlit í handilsmiðstøð 29
- 6.2. Eftirlit á bensinstøð 30
- 6.3. Eftirlit á fiskavirki 31

FORORÐ 2014

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2014 úr hondum. Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8 í persónsupplýsingarlógini, og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2014. Í mun til í fjør er talið av innkomnum málum lækkað og er lækkingin 9,34 %. Hetta skyldast, at í 2013 vórðu sera nógv eins mál skrásett, av tí at Dátueftirlitið setti seg í samband við allar hýruvognsførarar í Tórshavn viðvíkjandi vakmyndatólum í hýruvognum.

Sum liður í, at persónsvernd og trygd á netinum er ein natúrligur partur av frálæruni í fólkaskúlanum, luttekur Dátueftirlitið eftir áheitan frá skúlunum í hesum arbeiði soleiðis, at vit vitja á skúlunum við framløgum, sum vit framleiða um viðkomandi evni.

Eftirlit er nú vorðið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum. Í 2014 vórðu framd 3 eftirlit. Ein eftirlitsvitjan var á einari handilsmiðstød, ein á einari bensinstød og tann triðja var á einum fiskavirki. Umframt varð arbeitt enn meira við sokallaðum skriviborðseftirliti, t.e. eftirlit, ið ikki verður framt á staðnum, men umvegis skrivligt samskifti. Eisini tók Dátueftirlitið nøkur mál upp av egnum ávum, m.a. eitt mál har fyrispurningur bleiv sendur til Mentamálaráðið um, at úrslitini frá landsroyndunum hjá fólkaskúlanum vórðu goymd á einum servara í Kanada. Eisini blivu fyrispurningar settir telefyritøkunum um logging, fyrispurningur bleiv settur til NÁM um FirstClass skipanina og fyrispurningur bleiv settur til Landssjúkrahúsið um talgildu heilsuskipanina.

Føroyar fingu í 2010 eina triðjalandsgóðkenning frá ES í sambandi við flutning av persónupplýsingum tvørtur um landamørk. Góðkenningin merkir, at Føroyar koma á listan yvir trygg triðjalond, og at ES metir Føroyar vera eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag. Góðkenningin setir størri krøv til eftirlitið hjá Dátueftirlitinum við kt-trygdini í Føroyum.

Tórshavn, 18. juni 2015

Eyðbjørn M. Larsen
Formaður í Dáturáðnum

Eyðhild Skaalum
Stjóri í Dátueftirlitinum

2 Dátueftirlitið

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki. Dátueftirlitið hevur nú fíggjarligt tilknýti til Løgmansskrivstovuna, men er í virksemi sínum óheft av ráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum eru sambært lógini fyrisitingarliga endaligar.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, sum verður valt av løgmanni og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

Limirnir í Dáturáðnum 2012-2016:
Landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum tá var avvarðandi landsstýrismaður fyri Dátueftirlitið, valdi tann 1. november 2012 nýggjar limir í Dáturáðið. Samstundis eru varalimir valdir.

Í Dáturáðnum eru:
Eyðbjørn M. Larsen, advokatur, formaður.
Varalimur Rannvá Sólheim, løgfrøðingur.
Óli Simonsen, KT-leiðari.
Varalimur Ólavur Ellefsen, stjóri.
Katrin Kallsberg, serlækni.
Varalimur Maria Dam, deildarleiðari.

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er 4 ár og gongur út 1. november 2016.

Skrivstovan:
Á skrivstovuni starvast trý fólk, ein stjóri, ein løgfrøðingur og ein skrivari.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum, bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2012 - 2014

Sundurgreinað ætlan Tús. kr.	2012 J	2013 J	2014 J
Nettoútreiðslujáttan	**2.000**	**2.000**	**2.000**
Lønir o.a.	1.640	1.640	1.640
Keyp av vørum og tænastum	270	270	270
Keyp av útbúnaði, netto	80	80	80
Leiga, viðlíkahald og skattur	10	10	10

2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2014 var: kr. 2.000.000,-

Vinstrumegin er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2012-2014.

2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Í 2014 vóru hesar reglur galdandi:

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.
- Kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Løgmansskrivstovuni hin 30. januar 2014.

2.3. UPPGÁVAN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta, ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð, uttan dómsskurð atgongd til øll høli, hadani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli, har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp.

3 Virksemi í árinum 2014

Dátueftirlitið hevur í 2014 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt kærur um viðgerð av persónsupplýsingum
- framt eftirlit
- svarað munnligum og skrivligum fyrispurningum
- vitjað og hildið framløgur fyri fólkaskúlum, miðnámsskúlum o.ø. kring landið
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum
- luttikið í norðurlendskum samstarvi
- skipað fyri tiltakinum "Tryggari Internetdagur"

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp. Somuleiðis er lóggávan lutfalsliga nýggj. Tískil er neyðugt at menna nýggjar mannagongdir á økinum, og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari tøkniligari menning, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2014 serliga verið um hesi evni:

- P-talið
- Innlit
- Handfaring hjá arbeiðsgevarum av teldupostkassa hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi
- Facebook og onnur sosial netverk
- Fyrispurningar viðvíkjandi kt-trygd
- At strika myndir og filmar á netinum
- Samankoyring av ymiskum skipanum
- Telefonsamskifti hjá starvsfólkum
- Hacking av teldupostskipanum o.ø.
- Loyvi til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar
- Kt-trygd
- Vakmyndatól
- Vevmyndatól

3.1. NORÐURLENDSKIR FUNDIR

Dátueftirlitið luttók í døgunum 19. til 20. mai 2014 á norðurlendskum dátueftirlitsfundi fyri starvsfólk á dátueftirlitunum. Hetta er fundur, sum verður hildin á hvørjum ári, har umboð fyri Føroyar, Ísland, Noreg, Svøríki, Finland, Áland og Danmark luttaka at umrøða ymisk viðurskifti, sum hava felags áhuga. Í ár varð fundurin hildin í Stokkhólmi í Svøríki. Á øðrum sinni varð roynt at halda ein felags fund, har bæði stjórar, fulltrúar, teknikarar og samskiftisráðgevar luttóku.

Nærri frágreiðing frá fundunum er at finna undir pkt. 5 í hesi ársfrágreiðing.

3.2. TRYGGARI INTERNETDAGUR

Tann 11. februar 2014 varð Tryggari Internetdagur hildin í Føroyum. Hetta er eitt árligt afturvendandi tiltak, sum verður hildið í meira enn 100 londum kring heimin, har tað verður varpað ljós á tryggari internetnýtslu á ymiskan hátt, serliga hjá børnum.

Dátueftirlitið plagar at halda dagin við at skipa fyri ymsum tiltøkum og kappingum á m.a. torginum í SMS og á Býarbókasavninum í Havn, har bæði børn og vaksin hava luttikið í spurnakappingum, teknikappingum, stuttsøgukappingum og øðrum. Í ár valdi Dátueftirlitið at halda dagin á Torginum í SMS, har teldur vórðu settar upp, soleiðis at øll fingu høvi at luttaka í spurnakappingini. Dátueftirlitið burturlutaði 3 iPhone 5s, har drigið varð millum øll tey luttakandi.

Í samband við Tryggari Internetdagin í ár, hevði Dátueftirlitið avgjørt at geva út faldara um viðurskifti millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, og varð hesin borin í hvørt hús.

Dátueftirlitið fær javnan eina rúgvu av fyrispurningum frá borgarum í Føroyum um sosialu netmiðlarnar. Talan er bæði um børn, ung og vaksin, ið venda sær til Dátueftirlitið antin við at ringja ella senda teldupost fyri at biðja um ráð og vegleiðing. Í flestu førum snúgva fyrispurningarnir seg um trupulleikar á Facebook, har stórur partur av borgarunum í Føroyum hava vangamynd. Her kann t.d. verða spurt hvørjar myndir kunnu leggjast á netið, nær krevst samtykki til almannakunngerð av myndum, hvussu kann følsk vangamynd meldast o.s.fr. Eisini fær Dátueftirlitið javnan áheitanir um vegleiðing at melda sonevndar slaturbólkar á Facebook. Haraftrat er ein afturvendandi trupulleiki, at fólk kenna seg útspilt og ærumeidd á Facebook.

Fyri at veita eina góða tænastu til allar hesar borgarar, ið ynskja vegleiðing um sosialu miðlarnar, gjørdi Dátueftirlitið fyri nøkrum

árum síðani av at seta í verk eina nýggja heimasíðu við heitinum "strikameg.fo". Endamálið við hesi heimasíðu er at leggja eina rúgvu av vegleiðingum til borgararnar á síðuna, soleiðis at fólk sjálvi kunnu leita sær ráð á síðuni ella finna rætta framferðarháttin at melda ein bólk ella strika eina vangamynd.

3.3. FRAMLØGA Á SKÚLUM

Dátueftirlitið hevur í 2014 nakrar ferðir verið úti á skúlum og greitt børnum og ungum frá, hvussu tey kunnu ferðast tryggari á internetinum. Eisini hava umboð fyri Dátueftirlitið luttikið á felags foreldrafundum, har greitt hevur verið frá arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum viðvíkjandi børnum og ungum, og har kjakast hevur verið um, hvønn leiklut foreldur og skúli hava.

Í 2014 hevur Dátueftirlitið hildið framløgu á hesum støðum:

- Framløga á Skúlanum á Ziskatrød
- Framløga á Søgu- og Samfelagsdeildini hjá Fróðskaparsetrinum
- Framløga á Sjúkrarøktarfrøðideildini hjá Fróðskaparsetrinum
- Framløga á Føroya Handilsskúla í Havn
- Framløga á Fróðskaparsetur Føroya

Dátueftirlitið fær eisini javnan skrivligar fyrispurningar frá næmingum úr ymsum skúlum í Føroyum. Talan er vanliga um fólkaskúlanæmingar, ið skriva uppgávu, sum spyrja Dátueftirlitið um nýtslu og misnýtslu av interneti og sosialum miðlum.

3.4. EFTIRLIT

Í 2014 var Dátueftirlitið á trimum eftirlitsvitjanum, har kannað varð, hvussu viðgerðin av persónsupplýsingum við vakmyndatóli fer fram, og um viðgerðin er í tráð við persónsupplýsingarlógina. Vitjað varð í einari handilsmiðstøð, einari bensinstøð og á einum fiskavirki. Fyri at lesa nærri um eftirlitsvitjanirnar, sí pkt. 6. Eisini vórðu ávís mál tikin upp av egnum ávum, umframt at skriviborðseftirlit vórðu framd, sí pkt. 4.2.

3.5. HAGTØL

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í journalskipanini hjá Dátueftirlitinum fyri 2014, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2014.

Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 2014 vórðu 233 nýggj mál skrásett. Í mun til í fjør, er talið av innkomnum málum lækkað og er lækkingin 9,34 %. Hetta skyldast, at í 2013 vórðu sera nógv eins mál skrásett, av tí at Dátueftirlitið setti seg í samband við allar hýruvognsførarar í Tórshavn viðvíkjandi vakmyndatólum í hýruvognum.

MYND 1 - Bólking av málum 2008 - 2014

Mynd 1 vísir talið av málum og munnligum fyrispurningum frá 2008 til og við 2014.



MYND 2. Bólking av nýstovnaðum málum í 2014 í tølum



MYND 3. Málsbýti í prosentum í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2013/2014

Á mynd 3 sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar, privatar fyritøkur og privatpersónar, sum venda sær til Dátueftirlitið.



Í 2014 vóru tølini hesi:

Almennir myndugleikar, stovnar o.t.	89
Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.	54
Privatpersónar	40
Kommunur	9
Fjølmiðlar	5
Innanhýsis	30
Annað	6
Ialt	233

MYND 4. Málsbýti í mun til evnisbólkar



Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar:

Vakmyndatól	27
Gransking	29
Starvsfólkaviðurskifti	8
Kt-trygd	35
Sosialar netsíður	10
Ummæli/hoyring	13
P-tøl	7
Eftirlit	6
Mál viðvíkjandi lógini generelt	23
Innanhýsis mál	28
Upplýsing og fyribyrging	13
Innlit	7
Annað	27
Ialt	233

3.6. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR

Í 2007 byrjaði Dátueftirlitið at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vórðu avgreiddir um telefon. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgarar ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing um telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í sambandi við verandi ella komandi mál.

Í 2014 vórðu 226 munnligir fyrispurningar skrásettir. Á myndini niðanfyri sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2014, kunnu bólkast.

MYND 5. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR



Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar, kommunur og advokatar:

Almennir myndugleikar, stovnar o.t.	56
Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.	63
Privatpersónar	86
Kommunur	8
Fjølmiðlar	13
Ialt	226

Almennir myndugleikar, stovnar o.t.

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, nær talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar, og nær tað er loyvt at víðarilata persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Í nógvum førum er talan um, at skúlar hava vent sær til Dátueftirlitið, har spurt verður um myndir og videobrot á netinum. Ein afturvendandi spurningur hjá almennu myndugleikunum er, hvussu reglurnar eru fyri nýtslu av p-talinum, um samankoyring av upplýsingum í ymiskum skráum, um innlit og ymiska starvsfólkaskráseting. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkaskráseting hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum umstøðum og treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar um síni starvsfólk. Tað kann t.d. vera upplýsingar úr teldupostskipanini hjá viðkomandi starvsfólki og loggur av heimasíðuvitjan. Talan kann harafturat verða um at fáa atgongd til starvsfólkaupplýsingar hjá fólki, ið eru í starvi, í sambandi við uppsagnartilgongd og hjá fólki, ið eru farin úr starvi.

Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.

Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum í 2014 snúðu seg um vakmyndatól og um nýtsluna av hesum. Eisini hava nógvir fyrispurningar verið um p-talið, har spurt verður nær p-talið kann nýtast. Harafturat vóru eisini nógvir fyrispurningar frá arbeiðsgevarum um viðgerð av persónsupplýsingum í starvsfólkaviðurskiftum, har arbeiðsgevarar ynskja at vita, hvørjar reglur eru galdandi viðvíkjandi eftirkanning av heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, nýtslu av sosialum netmiðlum o.s.v. Ein partur av hesum fyrispurningum um viðurskifti millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, hava snúð seg um viðgerð av persónsupplýsingum, tá starvsfólk er farið úr starvi.

Privatpersónar

Teir flestu fyrispurningarnir frá privatum borgarum snúgva seg um ymisk viðurskifti viðvíkjandi sosialum netmiðlum. Spurt verður t.d. hvussu ein bólkur ella følsk vangamynd kann meldast, hvussu vangamynd hjá deyðum brúkara verður strikað o.s.v. Nógv teir flestu fyrispurningarnir viðvíkjandi sosialum netmiðlum hava snúð seg um Facebook. Nógvir fyrispurningar frá privatum borgarum hava somuleiðis snúð seg um p-talið, og nær ein dátuábyrgdari hevur rætt til at skráseta hetta. Harafturat hava fyrispurningar verið um granskingarverkætlanir og um at fáa viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Fyrispurningar hava eisini verið frá persónum, ið eru farnir úr starvi, og sum vilja vita, um arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. At enda hava nakrir fyrispurningar verið um vakmyndatól á arbeiðsplássinum, sum t.d. nær tað er loyvt at hava vakmyndatól og undir hvørjum treytum.

Kommunur

Fyrispurningarnir frá kommunum í 2014 hava í høvuðsheitum snúð seg um nýtsluna av p-tølum hjá borgarum, har kommunurnar ynskja at vita, um p-talið kann skrásetast og undir hvørjum treytum. Eisini hava onkrir fyrispurningar snúð seg um víðarilatan av persónsupplýsingum, og undir hvørjum treytum hetta kann gerast.

Miðlar

Fleiri fyrispurningar eru eisini komnir frá fjølmiðlum. Í 2014 var munandi størri áhugi frá fjølmiðlunum um persónsupplýsingarlóggávuna enn undanfarin ár. Talan var um spurningar um ymisk viðurskifti frá tíðindabløðunum, internetportalum, útvarpi og sjónvarpi. Miðlarnir vendu sær til Dátueftirlitið m.a. viðvíkjandi logging, sosialum netmiðlum og flutningi av upplýsingum til útlond.

Virksemi í árinum 2014

Ein fyrispurningur var um tað er í lagi at almannakunngera upptøkur gjørdar av vakmyndatólum í sambandi við stuldur í einari krambúð.

Eisini vóru fyrispurningar um avlurtingarpakkan.

3.7. LOYVI OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

Viðgerðarloyvi:

Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvið at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvi eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga

ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

Fráboðan:
Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir, at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar, áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Ein kunngerð er gjørd við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum ikki eru viðkvæmar, verða viðgjørdar, skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um umsóknir um viðgerðarloyvir og fráboðanir.

3.7.1. Loyvi til verkætlanir
Dátueftirlitið hevur í 2014 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

3.7.2. Verkætlan: Nýføðingar við CTD

Dátuábyrgdari: Landssjúkrahúsið (Sigurð Ó. Vang)

Endamál: Kanna føðihagtøl hjá børnum við CTD og samanlíkna við børn uttan CTD.

Háttur: Upplýsingarnar verða savnaðar frá Talgildu Heilsuskipanini.

Viðgerðarloyvi: Loyvið er galdandi til 31. juli 2014.

3.7.3. Verkætlan: Evakueringsroyndir á bústovnum

Dátuábyrgdari: Bárður Toftum Petersen

Endamál: At gera evakueringsroyndir á bústovnum við fólki, ið hava menningartarn.

Háttur: Upplýsingarnar verða savnaðar við samtykki frá tí skrásetta.

Viðgerðarloyvi: Loyvið er galdandi til 30. apríl 2015.

3.7.4. Verkætlan: Eginumsorgan og vitan hjá sjúklingum við hjartasvíkjan

Dátuábyrgdari: Landssjúkrahúsið (Katrin á Lakjuni og Jacoba Thomsen)

Háttur: Upplýsingarnar verða savnaðar frá skrásettu persónunum við spurnablaði.

Viðgerðarloyvi: Loyvið er galdandi til 1. januar 2017

3.7.5. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum
Dátueftirlitið hevur í 2014 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Talan hevur verið um verkætlanir, har persónar ikki kunnu eyðmerkjast og um verkætlanir, har viðkvæmar persónsupplýsingar ikki hava verið viðgjørdar.

3.7.6. Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir)
Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin), og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Dátueftirlitið metir, at heimildin hjá Ílegusavninum í §§ 3-5 og 7 í Ílegulógini til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, eisini fevnir um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í ítøkiligu verkætlanunum.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, krevst onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta eru fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, og hevur hetta við sær, at loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum til ítøkiligu verkætlanirnar hjá Ílegusavninum, men at hesar tó skulu fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið hevur upp á ítøkiligan fyrispurning svarað Ílegusavninum, at mett verður ikki, at tað ber til at gera eina fráboðan, sum fevnir um bæði generellu skipanina og verkætlanir sum heild, orsakað av, at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingarlógini. Verkætlanirnar skulu sostatt fráboðast Dátueftirlitinum í hvørjum einstøkum føri.

Í 2014 hevur Ílegusavnið fráboðað hesa verkætlanir:
- Glaukom på Færøerne. Epidemiologi, genetik og arvelighed
- Familiær hyperkolesterolæmi på Færøerne. Epidemiologi, genetik og arvelighed
- Monitorering og kvalitetsundersøgelser af AK behandling på Landssygehuset
- Cøliaki på Færøerne. Epidemiologi, genetik og arvelighed
- Characterizing Spondyloarthritis Subtypes (SpA)
- Forkanningar verkætlan Cancer mammae og PCB i navlesnorsblod

3.8. HOYRINGAR

3.8.1. Lógaruppskot

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Bekendtgørelse for Færøerne om risikomærkning af investeringsprodukter
- Bekendtgørelse for Færøerne om kompetencekrav til personer, der yder rådgivning om visse investeringsprodukter
- Broytingaruppskot til "Lov om finansiel virksomhed"
- Uppskot um ískoyti til grein 120 í skattalógini
- Uppskot til broyting í fjarskiftislógini
- Uppskot til løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

3.8.2. Kunngerðir

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesar kunngerðir til ummælis:

- Uppskot til kunngerð um gjøld fyri upplýsingar úr Landsfólkayvirlitsskránni
- Bekendtgørelse nr. 1359 af 22. december 2011 om puljepensioner og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v.
- Bekendtgørelse nr. 928 af 28. juni 2013 om god skik

3.8.3. KT-politikkur

Almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við kt-trygd og kt-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi kannað, um kt- politikkurin er beinleiðis í stríð við persónsupplýsingarlóggávuna og annars vegleitt og ráðgivið um ymisk viðurskifti í hesum sambandi.

3.9. VEGLEIÐINGAR

Dátueftirlitið leggur stóran dent á at framleiða vegleiðingar fyri ymisku økini sum liður í tí fyribyrgjandi arbeiðinum. Á heimasíðuni www.dat.fo eru allar vegleiðingarnar at finna.

4 Ávís útvald mál í 2014

4.1. YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein stutt lýsing av einstøkum útvaldum málum í 2014.

4.1.1. Kæra um skráseting av sjúkrafráveru

Ein sakførari vendi sær til Dátueftirlitið í samband við eitt starvsfólkamál hann hevði fyri ein sjúkrarøktarfrøðing, ið starvaðist á Landssjúkrahúsinum.

Málið snúði seg um, at viðkomandi sjúkrarøktarfrøðingur bleiv innkallaður til eina samrøðu av leiðara sínum. Undir samrøðuni vísti leiðarin á hvussu nógva sjúkrafráveru viðkomandi sjúkrarøktarfrøðingur hevði havt seinastu 10 árini.

Sjúkrarøktarfrøðingurin vendi sær til sakførara fyri at finna út av, um tað er loyvt at hava slíkar upplýsingar liggjandi í so langa tíð.

Sakførarin valdi at kæra Landssjúkrahúsið.

Landssjúkrahúsið svaraði aftur, at tað er ikki mannagongdin á Landssjúkrahúsinum at leiðarar í arbeiði sínum fara langt aftur í tíðina við sjúkrameldingum og at viðkomandi leiðari av misgáum ikki hevði givið sær far um, at ein ikki kann fara so langt aftur við sjúkrafráveru hjá starvsfelaga.

Deildarleiðarin, sum seinni var farin úr deildarleiðarastarvi sínum, viðgekk hetta og var til reiðar at geva nevnda starvsfólki eina umbering, sum viðkomandi tó ikki tók av.

Landssjúkrahúsið upplýsti harumframt, at slíkar eldri upplýsingar bert verða brúktar í heildarmyndum, til hagtøl og til yvirskipað hagtøl.

Sakførarin tók vegna klient sín kæruna aftur eftir hetta.

4.1.2. Fyrispurningur til Føroya Landfúta um vakmyndatól í hýruvognum

Í samband við áður umrøddu málini viðvíkjandi vakmyndatólum í hýruvognum, sum greitt er frá í ársfrágreiðingini hjá Dátueftirlitinum fyri 2013, vendi Dátueftirlitið sær til Føroya Landfúta.

Dátueftirlitið vildi hava greiðu á, um hýruvognsførarar hava heimild at hava vakmyndatól í hýruvognum sínum og at taka upp tað sum fyriferst frammanfyri bilin, tá teir koyra.

Hesin fyrispurningur bleiv settur av tí at Dátueftirlitið hevði fingið upplýst frá einum hýruvognsførara, at hesin hevði vakmyndatól í hýruvogni sínum, og hóast Dátueftirlitið setti seg í samband við viðkomandi hýruvognsførara fleiri ferðir fyri at spyrja nærri til hetta vakmyndatól og at fáa hann at fráboða viðgerðina við vakmyndatólinum til Dátueftirlitið, hevur hann ikki latið við seg koma.

Føroya Landfúti svaraði Dátueftirlitinum at tað ikki út frá fyriliggjandi upplýsingum var møguligt at avgera, um viðkomandi hýruvognsførari gjørdi nakað ólógligt við at hava vakmyndatól í hýruvogni sínum.

Fyri at kunna meta nærri um málið, vildi Føroya Landfúti hava upplýst hvat fyri eitt vakmyndatól talan var um, hvørjar myndir blivu tiknar, herundir um tað var møguligt at eyðmerkja persónar, ið komu uppá myndina.

Dátueftirlitið hevur síðani í skrivi latið Føroya Landfúta allar upplýsingar, sum Dátueftirlitið hevur í málinum, herundir navn og bústað hjá hýruvognsføraranum, skrásetingarnr. á hýruvogninum og víst Føroya Landfúta á, at hýruvognsførarin hevur ein profil á Facebook, har hann hevur lagt út upptøkur við vakmyndatólinum.

Dátueftirlitið bíðar nú eftir at Føroya Landfúti skal viðgera málið.

4.1.3. Vakmyndatól í nýggja terminalinum hjá Vága Floghavn

Í samband við at nýggi terminalurin hjá Vága Floghavn skuldi takast í nýtslu, fekk Dátueftirlitið eina fráboðan um vakmyndatól frá floghavnini.

Í floghavnini eru ialt 45 vakmyndatól, sum eru staðsett ymsastaðni. Endamálið við vakmyndatólunum er sambært fráboðanini at tryggja flogferðsluna og yvirvaking av flogvøllinum við fráferð og komu og yvirvaking av økjunum, ið verða nýtt til hetta endamál.

Harumframt eru 4 vakmyndatól staðsett í forhøllini og í tollfría handlinum, og er endamálið við hesum vakmyndatólum at fyribyrgja herverki og stuldri.

Eisini eru tvey fototól uppsett við innkoyringina til Vága Floghavn og er endamálið við hesum vakmyndatólum at taka myndir av nummarspjøldrunum á bilum, ið koyra inn og út av parkeringsøkinum hjá Vága Floghavn og verða hesar myndir goymdar, til rokningin fyri parkering er goldin.

Dátueftirlitið metti vakmyndatólini hjá Vága Floghavn at vera heimilað sambært § 8 jf. § 9, stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini. Ein fyritreyt er tó, at tey bara verða nýtt til fráboðaða endamálið, og at tey annars halda reglurnar í persónsupplýsingarlóggávuni.

4.1.4. Logging hjá telefyritøku

Dátueftirlitið gjørdi av at fremja skriviborðseftirlit hjá telefyritøku viðvíkjandi logging.

Fyrispurningur bleiv settur fram um loggur verður fórdur av nýtslu hjá privatkunda, bæði viðvíkjandi internetnýtslu, heimasíðuvitjanum og telefonnýtslu.

Spurt varð millum annað um upplýsingar viðvíkjandi telefonsamskifti og sms-boðum verða goymdar, eftir at kundin hevur goldið sína rokning og í samband við sonevnda avlurtingarpakkan, ið varð samtyktur í Løgtinginum, við undantaki av ásetingini um loggingina, vildi Dátueftirlitið hava at vita frá telefyritøkuni, á hvønn hátt nýggju ásetingarnar hava ávirkan á skrásetingina av persónsupplýsingum.

Telefyritøkan svaraði Dátueftirlitinum, men Dátueftirlitið metir ikki at svarið er nøktandi og tí er telefyritøkan innkallað til fund við Dátu-

eftirlitið til tess at umrøða málið nærri, og síðani at halda áfram við viðgerðini av málinum.

4.1.5. Mentamálaráðið og talgildu landsroyndirnar

Tað kom fram í fjølmiðlunum at ætlaða landsroyndin í fólkaskúlanum varð avlýst, grundað á, at ein servari í Kanada ikki riggaði sum hann skuldi, og tískil bar ikki til at gjøgnumføra royndirnar í Føroyum.

Í hesum sambandi fekk Dátueftirlitið fyrispurning frá Kringvarpinum um nakar flutningur av persónsupplýsingum var fráboðaður Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið skrivaði Mentamálaráðnum bræv harí Dátueftirlitið heitti á Mentamálaráðið um at koma við einari frágreiðing um, hvørt persónsupplýsingar vórðu goymdar í Kanada. Í játtandi føri varð heitt á Mentamálaráðið um at greiða frá, hvør viðgerðin var av hesum persónsupplýsingum hjá føroysku fólkaskúlanæmingunum, ið luttóku í landsroyndini, og sum Mentamálaráðið var dátuábyrgdari av, herundir hvørjar persónsupplýsingar talan var um, hvørjar upplýsingar vórðu fluttar av landinum, og hvussu hesin flutningur fór fram.

Mentamálaráðið svaraði Dátueftirlitinum at forritið Dokeos eftir ætlan skuldi nýtast til talgildu landsroyndirnar hjá næmingunum, og at henda skipan við uppgávum og næmingasvarum, sum eftir ætlan skuldi nýtast til landsroyndirnar í 2014, hevur ligið á einum ambætara í Kanada.
Sambært Mentamálaráðnum verða hesar upplýsingar ikki longur goymdar í skipanini, og ongar persónsupplýsingar hjá næmingum eru longur goymdar í Kanada. Dátueftirlitið gjørdi greitt yvir fyri Mentamálaráðnum at flutningur av persónsupplýsingum til útlond skal fráboðast Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið gjørdi Mentamálaráðnum vart við, at fráboðan skal latast Dátueftirlitinum í góðari tíð, um ætlanir eru at flyta persónsupplýsingar av landinum í framtíðini, og at undirskrivað dátuviðgerðaravtala skal gerast við dátuviðgeran, áðrenn persónsupplýsingar verða latnar dátuviðgerðanum.

4.1.6. NÁM og First Class skipanin

Dátueftirlitið sendi fyrispurning til Nám í samband við at sambært heimasíðuni hjá Námi, veitir Nám sjálvstøðuga tænastu innan kunningartøkni í skúlaverkinum við teldupost- og stevnuskipanini SamHøll, ið 17.000 brúkarar eru knýttir at.

Skipanin fevnir um allar næmingar og lærarar í skúlaverkinum og er bygd á forritið First Class. Nám umsitur skipanina, og er sostatt ábyrgdari av henni.

Dátueftirlitið ynskti m.a. at fáa at vita hvørjar persónsupplýsingar verða innsavnaðar og skrásettar um brúkararnar av skipanini, bæði við atliti til næmingar og lærarar og hvussu hesar persónsupplýsingar verða goymdar.

Nám svaraði Dátueftirlitinum, at skúlar senda Námi upplýsingar um næmingar og lærarar skúlans. Upplýst verður fult navn, føðingardagur og –ár, árið tá ið næmingurin er komin í skúla og flokkin, sum næmingurin gongur í. Nám ger eitt skrásetingarmerki og loyniorð, stovnar brúkarar í SamHøll/First Class og sendir upplýsingarnar aftur til skúlans leiðslu ella ábyrgdarfólk, sum skúlans leiðsla vísir til.

Dátueftirlitið hevur í 2004 givið Námi (tá nevnt KT-depilin) loyvi til at skráseting verður framd sbrt. lóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

4.1.7. Kæra um starvsfólkaviðurskifti á bensinstøð

Dátueftirlitið fekk eina kæru frá einum starvsfólki, ið arbeiddi á einari bensinstøð.

Kæran snúði seg um, at upptøkurnar frá vakmyndatólunum blivu nýttar til at hava eftirlit við starvsfólkunum. Upplýst varð í kæruni, at leiðarin á bensinstøðini hevði hugt at upptøkunum, fyri at vita um fólk vóru á støðini "eftir lukkitíð".

Umboð fyri bensinstøðina svaraði uppá kæruna og upplýsti í svarinum, at støðleiðarin hevði brúkt upptøkurnar frá vakmyndatólunum til at hava eftirlit við kærara, av tí at kærari skrivaði sær óvanliga nógva yvirtíð. Hon upplýsti eisini, at tólini bert vórðu uppsett fyri at fyribyrgja stuldri, men í hesum føri varð mett, at upptøkurnar kundu brúkast til starvsfólkaeftirlit.

Dátueftirlitið tók avgerð í málinum og gav kærara viðhald í pástandinum um, at upptøkurnar blivu brúktar til starvsfólkaeftirlit, ið er brot á §§ 8 og 9, stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini, og at talan hevur verið um ólógliga nýtslu av upptøkunum.

Dátuábyrgdarin skuldi eisini syrgja fyri, at allar upptøkur av kærara blivu strikaðar alt fyri eitt, um hesar ikki longu vóru tað. Eisini skuldi dátuábyrgdarin gera støðleiðaranum greitt, at støðugt eftirlit við starvsfólki er brot á persónsupplýsingarlógina, ið ikki eigur at koma fyri.

4.1.8. Streaming av býráðsfundum

Í ársfrágreiðingini fyri 2013 hjá Dátueftirlitinum bleiv skrivað um streaming av býráðsfundum og um, at Dáturáðið hevði viðgjørt hetta mál og tikið avgerð í málinum.

Sum ein avleiðing av hesari avgerð, gjørdi Dátueftirlitið av at skriva út til allar kommunur í Føroyum har upplýst varð, hvussu kommunurnar skulu fyrihalda seg í samband við streaming.

Upplýst varð í skrivinum, at streaming av býráðsfundum, ið inniber almannakunngerð av býráðslimunum, skal viðgerast eftir § 9, stk. 1 í persónsupplýsingarlógini, og merkir hetta, at streamingin antin krevur lógarheimild, ella greitt samtykki frá hvørjum einstakum býráðslimi, ið verður streamaður.

Eisini bleiv gjørt vart við, at býráðsfundir, ið verða hildnir fyri afturlatnum hurðum, um t.d. persónsmál, undir ongum umstøðum mugu streamast, hóast allir býráðslimir annars hava givið samtykki til streamingina.

Ávís útvald mál í 2014

4.1.9. Broyting av samtyktini um goyming av data

ES dómstólurin dømdi hin 8. apríl 2014 eitt ES direktiv um goyming av data (logningsdirektiv) at vera ógilda, tí tað ikki virðir rættin til privatlív.

Direktivið krevur, at ES londini goyma upplýsingar hjá privatpersónum frá telefon- og sms-samrøðum, fyri m.a. at forða fyri skipaðum brotsverkum og yvirgangi.

ES dómstólurin skrivar í sínari avgerð, at direktivið á serliga álvarsaman hátt ger inntriv í tann grundleggjandi rættin til virðing fyri privatlívi og verju av persónsupplýsingum.

Hetta ger ES direktivið sambært dómstólinum við at krevja, at ES londini goyma upplýsingar hjá borgarunum við at áleggja at telefeløgini skráseta og goyma upplýsingar um telefonsamrøður, sms-samskifti og internetferðslu í minsta lagi 6 mánaðar og í mesta lagi 2 ár.

Hetta hevur ført til nógv mótmæli í fleiri ES londum, harímillum Svøríki, sum hevur fingið milliónaupphæddir í bót fyri ikki at hava fylgt ásetingini í ES direktivinum við at gera svenska lóggávu í tráð við direktivið.

Dómurin er sagdur, tí at nøkur lond hava spurt ES dómstólin um direktivið fer útum tey grundleggjandi menniskjarættindini.

ES dómararnir samdust um, at sjálvt um tær upplýsingar, sum verða innsavnaðar, gott kunnu nýtast til at avdúka grov brotsverk og yvirgang, so er inntrivið í tey grundleggjandi persónligu rættindini ikki nóg væl avmarkað. Direktivið tryggjaði ikki, at innsavningin av data bleiv avmarkað til tað mest neyðuga.
ES direktivið er tískil ikki longur í gildi, og einstøku limalondini kunnu tí gera av hvørt tey vilja gera broytingar í egnari lóggávu á økinum, ella tey framhaldandi vilja hava somu lóggávu sum higartil, tó í neyðugan mun tillagað rættarstøðuni, soleiðis at hon er í samsvari við EU dómin.

4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

Sambært § 37, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini hevur Dátueftirlitið heimild til at taka mál upp av egnum ávum, og varð hetta í 2014 gjørt í fleiri førum, eins og sokallað skriviborðseftirlit vórðu framd.

Skriviborðseftirlit varð framt í málinum viðvíkjandi Mentamálaráðnum, har úrslitini frá landsroyndunum hjá fólkaskúlanum vórðu goymd á einum servara í Kanada. Eisini blivu fyrispurningar settir telefyritøkunum um logging, fyrispurningur bleiv settur til NÁM um FirstClass skipanina og fyrispurningur bleiv settur til Landssjúkrahúsið um talgildu heilsuskipanina.

Tað, sum eyðkennir londini kring okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv.

5 Altjóða samstarv

Tað, sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning, og er neyðugt orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari trygd hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES-nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES-londini gera, og á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond. Rættiliga strangar treytir eru hinvegin fyri flutningi av upplýsingum til triðjalond, sum ikki hava slíka góðkenning.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og tey londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Føroyar hava á hendan hátt, eins og ES, góðkent øll ES lond og lond, sum ES hevur lýst sum trygg triðjalond.

5.1. TRIÐJALANDSGÓÐKENNING FRÁ ES NEVNDINI

Innlendismálaráðið søkti í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Síðani hevur verið arbeitt við málinum, og í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevur góðkent Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES londum, tá tað snýr seg um viðgerð av persónsupplýsingum. Hetta merkir samstundis, at ES viðurkennir Føroyar sum eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag.

Triðjalands góðkenningin hevur við sær, at Føroyar nú koma á listan yvir trygg triðjalond millum m.a Ísland, Noreg og Sveits. Góðkenningin kemur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum, herundir peningastovnunum, at samskifta við útheimin.

Góðkenningin fer somuleiðis at hava týdning fyri gransking og ætlanirnar at fáa útlendskar granskarar til Føroyar at granska, fyri møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at marknaðarføra seg uttanlands og fyri ætlanirnar at bjóða Føroyar fram sum altjóða hosting miðdepil.

Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland kom í gildi tann 15. juni 2010.

5.2. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Føroyum, Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi, Álandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum. Hesir fundir hava í árunum frá 2005 til og við 2011 verið hildnir hvør sær, soleiðis at málsviðgerar hava møtst til sín egna fund, leiðarar hava havt sín fund, meðan teknikarar hava havt sín. Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á teimum árligu málsviðgerafundunum. Harafturat hevur Dátueftirlitið eisini fleiri ferðir luttikið á leiðarafundum, og í 2010 luttók Dátueftirlitið á fyrsta sinni á teknikarafundi. Í 2012 varð fyri fyrstu ferð roynt at hava ein samlaðan norðurlendskan fund fyri allar fakbólkar, har leiðarar, málsviðgerar, teknikarar og samskiftisfólk øll møttust til eina felags ráðstevnu.

Dátueftirlitið luttók á hesum samlaða norðurlendska fundi í døgunum 19. og 20. mai 2014, ið varð hildin í Stokkhólmi. Hetta varð skipað soleiðis, at tann fyrra dagin møttust allir fakbólkar til felags fund fyrrapart, meðan ymsu fakbólkarnir fundaðust hvør í sínum lagi seinnapart. Tann seinna dagin fundaðust ymsu fakbólkarnir hvør í sínum lagi.

Á fundunum vóru hesi mál á skránni:

Tann fyrra dagin vóru hesi mál á skránni fyrrapart:
Stjórar og fulltrúar viðgjørdu m.o. hesi evni:
- Eftirmeting av eftirliti hjá bankum
- Eftirmeting av eftirliti av svørtum kassum
- Eftirmeting av eftirliti hjá Spotify
- Uppskot um møgulig nýggj vanlig mál
- Samstarv eftir tí nýggju EU-samtyktini

IT-serfrøðingar viðgjørdu m.o. hesi evni:
- Hvat var hent síðani síðsta fundin, við serligum atliti til gjøgnumførd IT-eftirlit og úrslit av hesum.

Seinna dagin, har ymsu fakbólkarnir høvdu fund hvør sær, var ymiskt á skránni:
Stjórar viðgjørdu m.o. hesi evni:
- Kjak um framferðarháttir, virkni, arbeiðsháttir o.a.
- Data trygdarkanning
- Leiðslu kunnleiki
- Nýggja uppgávan viðvíkjandi kameraeftiransan hjá Data Inspektiónini
- Útsøgn hjá Dátueftirlitum um nýggja lóggávu
- Kjak um framtíðar fundir
- Aðrir spurningar

Fulltrúar viðgjørdu m.o. hesi evni:
- Dataverja í skúlum
- Privatar kanningar
- Vælferðar tøkni
- Heimild og atkomuleiki til persónlig dáta hjá kommunum
- Aðrir spurningar

IT-serfrøðingar viðgjørdu m.o. hesi evni:
- Frá tilmæli til umhugsan um IT-trygd
- Eitt nýtt slag av heimasíðutekstum
- Cloud tænastur innan heilsuverðina. Eyðmerking av borgara
- Eyðmerking. Tjóðskaparligt ID ella elD við biometri. Trygg eyðmerking sum grundarlag fyri samleika
- Aðrir spurningar

Á fundinum varð avgjørt, at í 2015 skulu Finland ella Áland verða vertur fyri fundinum.

Dátueftirlitið metir, at tað hevur týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra av londunum uttanum okkum. Hesi lond hava havt persónsupplýsingarlóggávu í longri tíð enn vit hava í Føroyum, og av tí, at tey, grundað á størri fólkatal, hava so mikið fleiri mál til viðgerðar enn vit.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað.

6 Eftirlit í 2014

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

6.1. EFTIRLIT Í HANDILSMIÐSTØÐ

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 18. november 2014 í einari handilsmiðstød á Skálafjørðinum. Eftirlitið snúði seg serliga um trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsingum í samband við vakmyndatól.

Handilsmiðstøðin hevur 15 vakmyndatól. Vakmyndatólini hanga ymsastaðni í miðstøðini.

Endamálið við vakmyndatólunum er at fyribyrgja innbroti og stuldri. Vakmyndatólini eru aktiv alla tíðina, og upptøkur verða gjørdar, tá rørsla er. Atgongd til upptøkurnar er frá skrivstovustaðnum hjá stjóranum. Talan er um eitt sonevnt "kontórlandskap", har vakmyndatólsskipanin einans er tøk frá skriviborðinum hjástjóranum. Telduskermurin til vakmyndatólsupptøkurnar vendir burtur frá øðrum skrivstovufólki og burtur frá inngongd til skrivstovuna. Bert tveir persónar hava atgongd til vakmyndatólsskipanina. Skipanin er avloggað í tí dagliga, og upptøkur verða bert nýttar, tá grundaður illgruni er um stuldur ella herverk. Loyniorð er knýtt at skipanini, ið bert tveir persónar hava kunnleika til. Onnur starvsfólk hava onga atgongd til vakmyndatólsskipanina. Einki internet er knýtt at telduni við upptøkunum.

Vakmyndatólsskipanin er uppsett soleiðis, at upptøkur ongantíð kunnu verða goymdar í meira enn 14 dagar. Undir eftirlitsvitjanini gjørdist greitt, at elstu upptøkurnar einans vóru 2 dagar gamlar. Ætlanin er tó at økja um orkuna, so upptøkur kunnu goymast í longri tíðarskeið, tó ongantíð meira enn 14 dagar.

Starvsfólk í miðstøðini verða munnliga kunnaði um vakmyndatólini. Viðskiftafólk verða kunnaði um vakmyndatólini við skelting á úthurðunum.

Krøv, ið skulu verða lokin:
Rúmið har servarin til vakmyndatólsskipanina stendur skal verða læst, so óviðkomandi fysiskt verða noktað atgongd til servaran. Somuleiðis skal skrivstovan verða læst, tá eingin er til staðar.

Tilráðingar frá Dátueftirlitinum:
Viðvíkjandi kravi um loyniorð á skipanina verður mælt til, at reglulig broyting av

loyniorði verður sett í verk, t.d. eina ferð árliga.

Dátueftirlitið mælir til, at niðurskrivaðar mannagongdir verða gjørdar viðvíkjandi nýtsluni og endamálinum við vakmyndatólunum.

Eftirlitsvitjanin gav annars ikki Dátueftirlitinum høvi til fleiri viðmerkingar.

6.2. EFTIRLIT Á BENSINSTØÐ

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 18. november 2014 á einari bensinstøð á Skálafjørðinum. Eftirlitið snúði seg serliga um trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsingum í samband við vakmyndatól.

Bensinstøðin hevur 12 vakmyndatól. 4 á økinum uttanfyri við pumpurnar, 1 á goymsluni, 1 í vaskihøllini og 6 tól á vørum í handlinum. Somuleiðis kundi staðfestast, at 1 av tólunum uttanfyri var óvirki, og gjørdi sostatt ongar upptøkur.

Endamálið við vakmyndatólunum er at hava eftirlit við atgongd, og at fyribyrgja herverki og stuldri. Harafturat varð upplýst, at vakmyndatólini í mestan mun verða nýtt til at fanga allar kundar, ið av onkrari orsøk ikki rinda fyri brennievni. Hetta hendir næstan dagliga, ella í minsta lagi nakrar ferðir um vikuna, upplýsti leiðarin á støðini. Øll starvsfólk hava atgongd til vakmyndatólsskipanina og kunnu fara inn at hyggja, hvør er rýmdur uttan at rinda fyri brennievni.

Atgongd til upptøkurnar er frá skrivstovu hjá leiðara, har upptøkurnar síggjast á skermi. Upptøkurnar verða goymdar á harddiski á staðnum, ið einans hevur til endamáls at goyma upptøkur frá vakmyndatólunum. Upptøkurnar verða vístar á serstakum telduskermi, ið bert er knýttur at tilhoyrandi harddiski við upptøkum. Einki internet er knýtt at telduni við upptøkunum.

Undir eftirlitsvitjanini gjørdist greitt, at upptøkur verða goymdar í mesta lagi í 14 dagar.

Viðvíkjandi trygdini er opin atgongd til skrivstovuna, har upptøkurnar verða vístar á skermi. Skrivstovan hjá leiðaranum er ongantíð læst, so øll starvsfólk hava ótarnaða atgongd til upptøkurnar. Loyniorð er til skipanina, og útgangsstøði er, at skipanin er loggað av. Øll starvsfólk hava kunnleika til loyniorðið og logga seg sostatt á skipanina, tá tørvur er á tí.

Starvsfólk fáa munnliga vegleiðing um nýtslu av skipanini og verða kunnaði munnliga við starvssetan um vakmyndatólini. Viðskiftafólk verða kunnaði við skelting á øllum hurðum.

Krøv, ið skulu verða lokin:
Dátueftirlitið metir, at upptøkur við vakmyndatóli í stóran mun eru skerjandi fyri persónliga frælsi og skulu nýtast við størsta varsemi. Hetta inniber m.a., at tað í størstan mun skal verða avmarkað hvør hevur atgongd til vakmyndatólsskipanina. Dátueftirlitið krevur sostatt, at bensinstøðin framyvir broytir mannagongdir soleiðis, at tað bert er leiðarin, ið hevur atgongd til vakmyndatólsskipanina. Í serligum føri kann leiðarin geva einum øðrum starvsfólki hesa atgongd, t.d. um leiðarin er í farloyvi, sjúkrameldaður, í feriu ella líknandi. Í slíkum førum skulu skrivligar mannagongdir verða fyri nýtsluni av upptøkunum.

Nýtt loyniorð til vakmyndatólsskipanina skal gerast, ið bert leiðarin hevur kunnleika til. Starvsfólk, ið verða varug við kunda, ið rýmir uttan at rinda fyri brennievni skulu sostatt ikki framyvir hava atgongd til skipanina, men eiga at geva leiðaranum boð. Leiðarin avgreiðir síðan málið við at hyggja at upptøkunum.

Tilráðingar frá Dátueftirlitinum:
Dátueftirlitið mælir til, at skelti um vakmyndatól verður sett við vaskihøllina, so viðskiftafólk, ið koyra inn í vaskihøllina, verða kunnaði um vakmyndatólið.

Viðvíkjandi loyniorði vil Dátueftirlitið mæla til, at loyniorðið er soleiðis samansett, at tað inniheldur minst 8 tekin, ið er samansett av bókstavum og tølum. Somuleiðis verður mælt til, at loyniorðið verður broytt regluliga, t.d. eina ferð árliga.

Bensinstøðin bleiv biðin um skjótast gjørligt at tryggja, at omanfyri nevndu krøv vórðu lokin, og samstundis boða Dátueftirlitinum frá, tá hetta var gjørt. Eisini fekk bensinstøðin eina freist at uppfylla nevndu krøv. Eftirlitið gav annars ikki høvi til fleiri viðmerkingar.

Málið er tikið upp við høvuðsskrivstovuna og eru mannagongdir gjørdar fyri øll sølustøð hjá hesum felagnum.

6.3. EFTIRLIT Á FISKAVIRKI

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 18. november 2014 á einum fiskavirki á Skálafjørðinum. Eftirlitið snúði seg serliga um trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsingum í samband við vakmyndatól.

Fiskavirkið hevur 12 vakmyndatól, harav 2 verða tikin niður í næstum. 1 tól stendur í rávørugoymsluni. Í maskinhøllini er 1 tól, ið tekur upp av allari høllini og 3 tól, ið bert filma fiskin. 1 tól filmar umrívingina, 2 tól eru í pakkihøllini, 1 tól í liðugtvørurúmi og 1 tól er uttanfyri.

Endamálið við vakmyndatólunum er at síggja framleiðsluna og fylgja við um okkurt steðgar upp.

Talan er einans um live myndir og ongar upptøkur verða goymdar.

Viðvíkjandi trygdini er opin atgongd til skrivstovuna, har upptøkurnar verða vístar á skermi. Skrivstovan er læst eftir arbeiðstíð. Tveir mans hava atgongd til servararúmið. Øll hava atgongd til skrivstovuna um hon er opin, hurðin verður stongd um dagin, um eingin er har. Tað eru 6 fólk, ið hava atgongd til skrivstovuna, tá ið hon er stongd, tað er umsiting, virkisleiðari og formenn.

Starvsfólk fáa munnliga kunning á fundum og við starvssetan. Viðskiftafólk og gestir eru kunnaði við skelting á úthurðini.

Krøv, ið skulu verða lokin:
Fiskavirkið skal gera sær greitt júst hvat er neyðugt at filma, fyri at røkka endamálinum við vakmyndatólunum um at síggja framleiðsluna. Alt óneyðugt, ið kemur uppá upptøkurnar skal ikki filmast. Hetta kann t.d. gerast við at snara ella zooma upptøkurnar soleiðis, at einans tað neyðuga verður filmað. Hetta kann eisini gerast elektroniskt, soleiðis at óneyðug øki verða blendað á upptøkunum.

Fiskavirkið skal skjótast gjørligt skipa soleiðis fyri, at áðurnevndu tól, har starvsfólk eru undir støðugum eftirliti, verða flutt, snara ella zooma soleiðis, at starvsfólk í minst møguligan mun eru at síggja á upptøkunum.

Fiskavirkið varð biðið um at siga Dátueftirlitinum frá, tá hesar broytingar vóru framdar.

Nakað av samskifti var síðani millum Dátueftirlitið og fiskavirkið og hevur fiskavirkið gjørt neyðugar broytingar til tess at lúka krøvini, sum Dátueftirlitið hevur sett.



ANNIJANNI

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið verjir tínar persónsupplýsingar

www.dat.fo